

## Maskinmeistarar søkjast til Elfelagið SEV

Eitt fast starv sum maskinmeistari á Fossáverkinum í Vestmanna er leyst at søkja til setan frá umleið juni 2006. Eisini verður søkt eftir einum feriuavloysara fyri maskinmeistarar á Fossáverkinum til summarferiuavloysing í ár.

**Starvið:**
Maskinmeistaraarbeiðið umfatar rakstur og hald av Fossáverkinum, bæði sum dagarbeiði og sum vaktarbeiði uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

Undir Fossáverkinum hoyra eisini Mýru-, Heyga- og Eiðisverkið, sum eins og vatnturbinan á Strond verða stýrd frá Fossáverkinum. Talan er um tilsamans 7 vatnturbinuaggregat við einum samlaðum mátti upp á 28,4 MW. Harafturat stýrir vakthavandi á Fossáverkinum býtið av framleiðsluni millum elverkini í meginøkinum, herundir eisini Sundsverkið og Strond (lastfordeiling). Eisini er vakthavandi á Fossá-verkinum koblingsleiðari fyri háspenningsanleggini í meginøkinum.

**Førleikakrøv:**
Kravt verður, at umsøkjararnir hava fulla maskinmeistaraútbúgving, t.v.s. víðkað maskinmeistaraprógv ella 3 ára maskinmeistaraskúlaprógv.

**Lønin:**
Starvið er lønt sambært 6. lønarflokk eftir sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið.
Lønin verður ásett eftir starvsaldri frammanundan.
Byrjunar- og endalønin í 6. lønarflokki er í løtuni netto ávikavist kr. 24.581,51 og kr. 26.288,56 um mánaðin. Harafturat verður goldið í eftirlønargjaldi tilsamans ávikavist kr. 3.072,69 og kr. 3.286,07 um mánaðin.

*Umframt nevndu løn kann roknast við vaktargjøldum og møguliga av og á eisini úrtíðarløn.*

**Umsóknir:**
Umsóknir skulu saman við prógvum og møguligum ummælum verða send Elfelagnum SEV, Postrúm 319, FO-110 Tórshavn og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi fríggjadagin, tann 2. juni 2006.

**Nærri upplýsingar:**
Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Pól Joensen, verksmeistara á Fossáverkinum ella til Berg Didriksen, deildarstjóra á Maskindeildini, báðir á telefon nr. 346800.

Elfelagið SEV

Sosialurin 341800

## Søkt verður eftir mekanikara/maskinsmiði til verkstað okkara.

Arbeiði fevnir um, at hava dagligu leiðsluna av verkstaðnum har afturat kundarøkt, umvælingar, servisu v.m.

Umsøkjarin má verða mekanikari ella hava aðra viðkomandi útbúgving.

sp/f O.K. HEILSØLA & MASKINUR

Handilin á kajuni í Hvalvík • Tel. 422 394 • www.okheilsola.com

# Einalærarastarv í Sandvíkar skúla

Tíðaravmarkað starv sum einalærari, fyri lærara í barnsburðarfarloyvi, í Sandvíkar skúla verður lýst leyst til setanar frá 1. august 2005 og 24 vikur fram. Starvstíðin verður møguliga longd, um farloyvistíðin verður longd.

Sandvíkar skúli hevur komandi skúlaár 5 næmingar í 1.-4. flokki.

**Um starvið**
Einalærarin undirvísir í øllum lærugreinum og hevur fyrisitingarligu ábyrgdina av skúlanum.

**Søkt verður eftir einum einalærara, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av dagligu undirvísingini
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar og at samstarva
- skal eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt.

Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag í lønarflokkunum 21.2.-30.2.

Umsókn saman við prógvi, C. V. o. ø. skal vera Sandvíkar skúla í hendi í seinasta lagi 2. juni 2006 kl. 16.00.

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar til starvið, kunnu ringja til einalæraran Nitu Næs á tlf. 375917.

# Stuðul

Viðareiðis Kommuna søkir eftir stuðli til at byrja 1. juni, til barn við serligum tørvi.

Starvið er 35 tímar um vikuna til hálvan august, síðan umleið 20 tímar um vikuna.

Umsøkjarar við námsfrøðiligari útbúgving ella royndum á økinum hava fyrimun.

Tann, ið søkir skal hava egnan bil til at koyra barnið til ymisk tiltøk.

Løn sambært avtalu ella við avvarðandi yrkisfelag.

Um spurningar eru til starvið, ber til at venda sær til dagrøktarleiðaran á tlf. 588053.

Umsóknarfreistin er 26. mai.

Umsóknir við møguligum prógvum og/ella viðmælum verða at senda til:

**Viðareiðis Kommunu**
FO-750 Viðareiði

# Lærarastørv og starv sum stuðul

## í Fuglafjarðar skúla

Hesi størv verða lýst leys til setanar:
- **2 lærarar í fast starv frá 1. august 2006**
- **5 lærarar í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2006/2007**
  fyri lærarar í farloyvi, lækkað tímatal, serligan tørv og avlopstímar
- **1 lærari í tíðaravmarkað parttíðarstarv (uml. 0,7) frá 14. august til 19. desember 2006**
  fyri lærara í barnsburðarfarloyvi
- **1 tíðaravmarkað starv sum stuðul (uml. 20 t/viku) skúlaárið 2006/2007**
  Talan er um eitt starv sum stuðul hjá næmingi í 4. flokki, sum hevur serligan tørv.

**Søkt verður eftir lærarum, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- eru stundisligir og nærlagdir

**Harafturat skulu lærararnir hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum lærugreinum:**
- kristnikunnleika, føroyskum, donskum, enskum, støddfrøði, náttúru/tøkni, lívfrøði, ítrótti, tónleiki, evning, handarbeiði, heimkunnleika, bókasavn og serligan tørv.

**Førleikakrøv:**
Tey, ið verða sett í lærarastørvini, skulu hava læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum

Tann, sum verður settur í starv sum stuðul, skal hava útbúgving sum námsfrøðingur ella samsvarandi førleika

**Lønar- og setanartreytir:**
Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann, sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Tímatalið til eitt av tíðaravmarkaðu lærarastørvunum verður ikki endaliga ásett fyrr enn 1. september 2006.

Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4

Starvið sum stuðul verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi mikudagin 31. mai kl. 10.00.**

Setanarsamrøður verða í døgunum 1.-7. juni

Nærri kunning um størvini fæst við at ringja til Súna í Hjøllum, skúlastjóra, á tlf. 444087 ella 214087. Eisini ber til at senda teldupost til skúlastjóran: suni@ffs.fo

Fuglafjarðar skúli hevur komandi skúlaár umleið 335 næmingar í 19 flokkum. Við skúlan fara at starvast 34 lærarar, 1 stuðul, 1 húsavørður og 4-5 reingerðingarfólk. Áhugað kunnu lesa meira um skúlan á heimasíðuni: www.ffs.fo